Koyring uttanlands:

# Ikki líka mikið við dekkunum

**Nú summarið kemur, og nógv fara uttanlands at koyra, hevur tað stóran týdning at koyra við teimum røttu góðkendu dekkunum. Í Týsklandi hendir tað meir enn so, at bilførarar verða sendir heim aftur, tí dekkini á bilinum ikki eru tey røttu**

DEKK

Tað er vorðið alt meira vanligt, at bilførarar velja at koyra við vetrardekkum alt árið. Orsøkini er helst, at vetrardekkini eru meira ljóðleys og bleyt at koyra á.

Í Týsklandi halda ferðslutrygdarmyndugleikarnir at 20. hvør bilur koyrir við vetrardekkum alt árið. Men týskarar ávara ímóti, at koyrt verður við vetrardekkunum alt árið, av tí orsøk at vetrardekk eru gjørd úr bleytari gummi og verða tí skjótari heit undir koyring á týsku motorvegunum, har eingin ferðavmarking er. Um bilarnir eru tungt lastaðir og ferðin er nógv, kunnu vetrardekkini skjótt gerast ov heit, samstundis sum bremsulongdin økist munandi á turru og heitu koyribreytini.

Týsku myndugleikarnir ráða tí fólki til at nýta vetrardekk frá oktober og fram til páskir.

Her hjá okkum er hesin trupulleikin ikki so stórur, men tey sum koyra uttanlands eiga at hava hetta í huga og altíð koyra við teimum røttu góðkendu summardekkunum. Tað hendir seg meira enn so, at bilførarar verða steðgaðir við markið inn til Týsklands og verða sendir heim aftur, tí dekkini á bilinum ikki eru tey røttu. Dekkini skulu verða merkt við røttu merkingini, sum svarar til tað ferðina, sum bilurin í mesta lagið kann koyra. Eisini verður hugt eftir um dekkini ikki eru ov nógv slitin.




*Hendan talvan hjá Rådet for større Dæksikkerhed vísur hvussu lítið vegfesti slitin dekk hava í regni. Myndirnar eru tiknar undir einum glasrúti, sum bilurin koyrir omaná. Til dømis sæst, at dekkið hevur so at siga einki vegfesti við 125 km/t og 1,6 mm mynsturdýpd, tá vatnstøðan er 3 mm.*





· Umvæling av tryggingarskaðum og privat skaðum
· Vit umvæla øll bilmerki
· Klárgering til sýn
· Bremsur, útstoyt, stoytdoyvarar, rustarbeiði o.m.a.



Ring og fá eitt tilboð

Sp/f Plátuverkstaðið
Falkavegur · Tórshavn · Tel 321778 ella 221778
Teldupostur: plv@plv.fo


# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**

Fyrivarni verður tikið fyri villum



**MITSHUBISHI PAJERO SPORT TDI VAN**
Árg Dec-05, Km 6500. Kr. 229000. Klimaanlegg, leðursetur, cd, el-rútar og -spegl, krók, hita í setrunum, tónaðar rútar, gátir, vel, sportsfelgur. Bilurin er sum nýggjur. Nýprísur 290.000.

**Tlf. 588880**



**TOYOTA COROLLA 2.0 DIESEL**
Árg 1996, Km 175000. Kr. 50000. Nýsýnaður, hevur krók.



**TOYOTA CARINA E 2.0 GLI**
Árg 1998, Km 100000. Kr. 69000.



**FORD FOCUS 1.6**
Árg 2005, Km 11000. Kr. 175000. Bilurin er sum nýggjur.



**OPEL VECTRA 2.5 DIESEL**
Árg 1997, Km 180000. Kr. 44000.



DF076
**FORD FOCUS 2.0/135 HK TREND**
Árg 1999, Km 92000.Kr. 75000.



**SAAB 9-3 2.0**
Árg 1998, Km 85000. Kr. 115000. Sera væl útgjørdur og super væl viðfarin.



**TOYOTA COROLLA AUT 1.6I**
Árg 1992, Km 118000. Kr. 22000. Aut gear, powerstýring.

BILRØKT
BILROKT.fo v/Jákup á Borg
Varðagøta 77 · FO-110 Tórshavn
tel: 58 88 80 · bilrokt@bilrokt.fo